## Gjógvin ikki breiðkað

Herfyri kunngjørdu arbeiðarafelkøgini eina kanning, sum vísti, at gjógvin millum tær hægru og tær lægru lønirnar er breiðskað, men hesum vísir Vinnuhúsið nú aftur. Við tølum frá Hagstovuni vísir Vinnuhúsið á, at lønarmunurin millum ein arbeiðsmann og ein starvsmann er minkaður úr 26 í 21 prosent tey seinastu tjúgu árini. Orsøkin er, at lønarhækkingarnar eru goldnar í krónum og oyrum heldur enn í prosentum, sigur Vinnuhúsið.

## Minni av landinum

Munandi minni fiskur fór óvirkaður av landinum í fjør enn í 2005. Tøl hjá Hagstovuni vísa, at í fjør vóru 15.000 tons av toski, hýsu og upsa óvirkað av landinum. Tað var meiri enn 10.000 tons minni enn í fyrraárið og samstundis tað minsta síðani 2001. Av teimum 15.000 tonsunum, sum fóru óvirkað av landinum, vórðu 12.000 tons avreidd í Føroyum fyrst og síðani send av landinum. Tey seinastu 3.000 tonsini vórðu landað uttanlands.

# Marnar Dam sera óheppin



*Teir standa og práta á dekkinum á alibátinum Jónleyg, tá báturin verður handaður Pan Fish. Marnar Dam er maðurin næst uttastur til høgru*

**- Endamálið við slíkum kanningum er at útvega upplýsingar um vanlukkur og at fáa greiði á tilburðargongd og orsøkum, ið hava við sær, at slíkar vanlukkur henda, sigur Óla Hans Hammer, stjóri á Skipaeftirlitinum**

VANLUKKA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Vit hava eisini til uppgávu at gera tilráðingar og taka neyðug stig til at minka um vandan fyri, at tílíkar vanlukkur henda aftur.

Tað sigur Óla Hans Hammer, stjóri á Skipaeftirlitinum, sum nú hevur kannað tilburðin um syndarligu vanlukkuna umborð á eini alibáti á Oyndarfirði mánadagin.

Stjórin vísir á, at eingi sjónarvitni vóru til hendingina.

- Tveir alibátar arbeiddu við alibrúkið á Oyndarfirði hendan morgunin. Tveir mans vóru á øðrum bátinum og ein maður á hinum.

Hann sigur, at Marnar Dam, sum var einsamallur umborð á Jónleyg, var í holt við at stramma eina fortoyning, tá hann sera óheppin gjørdist fastur í eina bukt og kleimdist til deyða.

Óla Hans sigur, at sjálvandi ber ikki til heilt neyvt at siga, hvat er hent, men Skipaeftirlitið hevur gjørt sínar metingar av øllum tilburðinum og hevur nú skrivað eina ávegis frágreiðing, sum stovnurin fer at tosa nærri um.

- Kanningarnar vísa, hvat maðurin hevur gjørt og hetta, sum hann hendan morgunin tókst við, hevur hann einsamallur á báti gjørt nógvar ferðir áður.

Og kortini hendi tað.

- Kanningarnar vísa, at maðurin hevur verið ógvuliga óheppin, og tískiil hendi tað ringasta, sum henda kundi, sigur stjórin á Skipaeftirlitinum.

Óla Hans sigur, at kanningarnar benda á, at at ein endi er lopin úr eini rullu afturi á hekkuni á bátinum, og soleiðis er maðurin komin fastur í eina bukt.

- Í stuttum kunnu vit siga, at maðurin var komin at standa á skeivum staði í bátinum – í tí skeivu og sera óhepnu løtuni, tá buktin leyp úr rulluni.

Óla Hans sigur, at tað, sum kann vera orsøkin til, at buktin leyp úr rulluni, er, at ein keta, sum lá um ein enda, er gliðin á endanum, soleiðis at alt strammaðist aftur.

- Men hetta vita vit ikki við vissu, sigur hann.

Óla Hans Hammer sigur, at alibáturin lá væl bundin til ringarnar, og at Skipaeftirlitið hevur góðkent bátin, sum er rættiliga nýggjur.

- Tað er einki galið við bátinum, og dekkið er bæði gott og arbeiðsligt at síggja til, sigur stjórin á Skipaeftirlitinum.

# Fara á sild eftir

**- At vit nú kunnu veiða ein part av sildakvotuni í norskum sjógvi, fer at gera, at vit betur kunnu leggja veiðina til rættis. Nú kunnu vit fylgja sildini inn í norskan sjógv, tá hon fer hagar. Veiðan í føroyskum sjógvi nýtist tískil ikki at verða so "intens", sum hon hevur verið, tí sildin kanska er á veg úr føroyskum sjógvi, sigur Kristian Martin Rasmussen, reiðari**

SILD
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Christian í Grótinum landaði 1800 tons av svartkjafti á Fuglafirði í gjár. Skipið fer útaftur í dag, og nú fiskiskapurin eftir svartkjafti ikki roynist so væl longur, verður farið útaftur at leita.

Á seinasta túri var lítið at fáa, og skipini hava sum heild havt slakan fiskiskap í seinastuni.

Norðborg, sum sama felag í Klaksvík eigur, er til fiskiskap, men eisini hjá teimum hevur lítið borið til í seinastuni.



### Skipini leita

Kristian Martin Rasmussen, reiðari, sigur, at skipini, sum í løtuni eru úti, leita eftir svartkjafti í føroyskum sjógvi á leiðunum norður úr Mykinesi.

- Eg havi skilt, at har eru bæði føroysk og íslendsk skip, og russar eru eitt nú á leiðunum í ein útsynning úr Føroyum, eisini í føroyskum sjógvi.

Reiðarin sigur, at fiskiskapurin í løtuni er smáligur yvir tað heila, sum hann tekur til.

Hann væntar, at tekur svartkjafturin seg ikki uppaftur nakað skjótt, fara flestu føroysku skipini á sild eftir hvítusunnu.

- Enn er kanska heldur tíðliga til sildina, tí enn hevur hon ikki fingið røttu fitina eftir gýting í vár. Men hesa tíðina broytist sildin skjótt, leggur Kristian Martin aftrat.

### 80% framleiðsla

Í fjør veiddu Christian í Grótinum og Norðborg tilsamans 13.000 tons av norðhavssild. Ein part av tíðini partrolaðu skipini, samstundis sum veiðan varð virkað umborð á Norðborg, ið hevur 6 flakalinjur umborð. Parturin, sum teir 23-25 menninir umborð á Norðborg ikki náddu at virka, varð landaður til virkir á landi.

-Samlaða flakaframleiðslan umborð á Norðborg í

# Tjóðveldisfelag nýggjan formann

**Maud V. Hansen er nýggjur formaður í Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag**

AÐALFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag hevði aðalfund 21. mai, og á skránni var eitt nú formansval og nevndarval.

Formaðurin seinastu árini, Hjørdis Heindriksdóttir, ynskti ikki at halda fram.

### Maud formaður

Aðalfundurin gjørdi av at velja eina aðra kvinnu, Maud V. Hansen, í staðið hjá Hjørdis, og tískil verður tað enn ein kvinna, sum fer at leiða tjóðveldisfelagið í høvuðsstaðnum frameftir.

Umframt formannin, sita nú í nevndini í Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag, Rubek Lilaa, næstformaður, Ragnar Magnussen, skrivari, Oluffa undir Kletti, peningarøkil og Petur í Gong, nevndarlimur.



*Maud V. Hansen loysir nú Hjørdis Heindriksdóttir av sum formaður í Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag*